## Jóhanna situr heima

Í morgin fara íslendingar á fólkaatkvøðu at taka støðu til lógina, sum Altingið samtykti tann 30. desember í Icesavemálinum, men sum forsetin ikki vildi staðfesta. Jóhanna Sigurðardóttur, forsætisráðharri, fer ikki í valhølið. Hon segði í gjárkvøldið, at royndin at fáa eina betri avtalu við Bretland og Niðurlond hevur givið batar, men at íslendingar mugu byrja aftur av nýggjum, vrakar fólkið ta seinastu samtyktina hjá Altinginum. Politiska andstøðan í Íslandi mælir fólkinum til at vraka lógina frá 30. desember.



## Á aðrar oljuleiðir

Hóast A.P.Møller-Mærsk hevði søguliga stórt hall í fjør, ætlar felagið at brúka fleiri milliardir krónur til íløgur í eitt nú nýggjar oljuleiðir. Tað sigur stjórin, Nils Smedegaard Andersen, við Berlingske Tidende. Millum annað er ætlanin at gera stórar íløgur í oljuleiðir í Brasil, Angola og Meksikanska Flógvanum, og málið er at tryggja felagnum oljuvirksemi, tá keldurnar í Norðsjónum fara at torna upp um nøkur fá ár. Tað fer eisini at ávirka ríkiskassan, at A. P.Møller-Mærsk flytir oljuvirksemið til onnur lond, tí oljan í Norðsjónum gevur ríkiskassanum nógvar milliardir krónur um árið.

# Smyril Line risa turn-around

**Nevnd og stjóri í Smyril Line hava vent fíggjarligu gongdini í felagnum frá einum undirskoti á 207 milliónir til eitt avlop á 16 milliónir krónur**




*Peter Holm, forstjóri, Claus Kjærulff, nevndarformaður, og Rúni Vang Poulsen, fíggjarstjóri í Smyril Line*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

TURN-AROUND

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara neyð og elendigheit í føroyskum vinnulívi.

Vit hava í stóran mun hoyrt um frálíku gongdina hjá Bakkafrost, og nú kann so enn ein sólskinssøga staðfestast í føroyskum vinnulívi.

Smyril Line legði í morgun fram roknskapin fyri 2009, og hann vísti eitt avlop á 15,827 milliónir krónur. Og sæð í ljósinum av, at úrslitið fyri 2008 vísti eitt hall á heilar 207 milliónir krónur er talan um eitt turn-around av teimum gigantisku.

Nú skal tað fyri rættvísis sakir við í søguna, at 121 av teimum 207 milliónunum í halli stavaði frá einari niðurskriving av Norrönu, men kortini er talan um eina vend av gongdini við hundrað milliónum krónum.

Hetta er í stóran mun gjørt við at skera burtur av útreiðslunum. Nettovinningurin er á nøkurlunda sama støði sum í 2008, 211.513 milliónir í 2009 móti 207.830. Men tað er serliga í bruttovinninginum, at stóri munurin er at finna.

Í 2009 var bruttovinningurin 109.360 milliónir og starvsfólkakostnaðurin 48.657. Hesi tølini vóru fyri 2008 ávikavist 52.874 og 60.556 og tað merkir, at úrslitið áðrenn av- og niðurskrivingar var 60.703 fyri 2009 ímóti -7.682 fyri 2008. Ein munur á nærum 70 milliónir krónur.

### Broytt rutunet

Høvuðsorsøkirnar til stóru broytingarnar í fíggjarligu gongdini, er ein umlegging av rutunetinum.

- Vit eru givnir at sigla upp á Noregi og Hetland, og í tí sambandi hava vit eisini spart burtur tær útreiðslur vit høvdu í Bergen og Lerwick við skrivstovum og øðrum. Somuleiðis hava vit skorið niður upp á starvsfólkatalið annars, so vit í dag selja tað sama við færri starvsfólkum, sigur Peter Holm, forstjóri í Smyril Line.

Ein av stóru spurningunum í sambandi við umleggingina var, um teir megnaðu av avgreiða Norrönu innan ta tíðarfreist, ið var tøk í teimum trimum havnunum.

- Vit umhugsaðu alternativ, um vit ikki megnaðu at halda tíðarfreistina, men tað vísti seg als ikki at vera nakar trupulleiki. Vit megnaðu ta einu ferðina at tøma skipið á Havnini fyri túsund ferðafólk og 300 bilar og fáa onnur túsund umborð aftur saman við 300 bilum eftir bert 55 minuttum, sigur Peter Holm.

Broytta rutunetið við at sigla tvær ferðir upp á Hanstholm um vikuna umframt ein túr til Seyðisfjarðar merkir eisini, at Smyril Line nú hevur pláss at vaksa.

- Gomlu ruturnar gjørdu, at skipið var ovurfylt á nøkrum rutum, meðan tað sigldi hálvtómt á øðrum. Við nýggja rutunetinum flyta vit meiri javnt av ferðafólki, og hava tí pláss fyri at vaksa, sigur Peter Holm.

Samstundis sum rutunetið varð lagt um, bar til at fokusera sterkari ávísar marknaðir við ávísum »produktum«, og tí kunnu teir konsentrera meiri um hesar marknaðir.

### Avbjóðingar eru

Góða úrslitið fær eisini nevndarformannin, Claus Kjærulff, at fegnast. Hann heldur, at tað hevur ómetaliga stóran týdning fyri felagið, at teir nú kunnu vísa á eitt avlop, tí tað hevur ikki verið so vanligt hjá Smyril Line áður.

- Smyril Line hevur ikki altíð havt tað besta orðið á sær fíggjarliga, men eg haldi vit kunnu merkja, at okkara bankasambond eru meiri positivt sinnað mótvegis okkum nú, sigur Claus Kjærulff.

Hann leggur tó dent á, at talan enn bert er um fyrsta stigið á leiðini, og at avbjóðingin verður at fáa líknandi úrslit í árunum frameftir.

Eisini forstjórin ásannar, at tað liggja avbjóðingar fyri framman.

- Vit hava sett sum mál at fáa eitt avlop á umleið 13 milliónir fyri komandi ár eisini, men samstundis mugu vit sanna, at tað verður enn truplari enn í ár, tí forsøgnir siga, at oljuprísirnir verða 50% hægri í ár í mun til 2009 , sigur Peter Holm.

Tað er eisini ein avbjóðing, at meginparturin av inntjeningini hjá Smyril Line er í summarhálvuni, og tí kann tað gerast eitt sindur tungt við gjaldførinum vetrarhálvuna. Tað hevur tó ikki skapt trupulleikar higartil.

- Tað positiva, sum vit longu nú kunnu síggja er, at bíleggingarnar fyri 2010 eru enn fleiri enn tær vóru fyri 2009, so málið er tað sama, sum í fjør, 13 milliónir krónur í avlopi, sigur Peter Holm.

Hann staðfesti, at hóast nakað av tosi hevur verið um sigling upp á Stavanger, so liggur eingin rutubroyting í kortunum.

- Vit hava gjørt okkara broytingar í rutunetinum, og tað er hetta, vit halda okkum til frameftir, sigur Peter Holm, forstjóri í Smyril Line.

| **Høvuðstøl / Financial highlights** | **2009** | **2008** |
|---|---|---|
| Nettosøla / *Net sales* | 211.513 | 207.830 |
| Bruttovinningur / *Gross profit* | 109.360 | 52.874 |
| Starvsfólkaútreiðslur /*Staff costs* | -48.657 | -60.556 |
| EBITDA / *EBITDA* | 60.703 | -7.682 |
| Niðurskrivingar / *Write downs* | 0 | -121.461 |
| Avskrivingar / *Depriciations* | -20.345 | -20.723 |
| EBIT / *EBIT* | 40.358 | -149.866 |
| Úrslit av kapitalpørtum / *Result from* | 1.872 | 912 |
| Fíggjar útreiðslur, netto / *Interest payables* | -26.403 | -58.930 |
| Úrslit áðrenn skatt / *Result before tax* | 15.827 | -207.884 |
| Ársúrslitið / *Net profit* | 15.827 | -207.884 |
| Støðisogn til samans / *Non current assets* | 553.798 | 554.106 |
| Ogn í umferð / *Current assets* | 42.741 | 65.783 |
| Ogn til samans / *Total assets* | 596.539 | 619.889 |
| Eginpeningur / *Equity* | 102.557 | 86.730 |
| Avsetingar / *Provisions* | 0 | 7.500 |
| Langfreistað skuld / *Non-current liabilities* | 416.694 | 451.809 |
| Stuttfreistað skuld / *Current and other liabilities* | 77.288 | 73.850 |
| Skyldur til samans / *Total equity and liabilities* | 596.539 | 619.889 |